# Kassarnir tómir



*Øssur Hansen spældi í fjør við danska B93, men tað var honum skjótt greitt, at felagið ikki megnaði at halda treytirnar, sum leikararnir høvdu fingið lovað*

**Tvey fyrrverandi útisetafeløg eru í vikuni farin í gjaldssteðg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er sum so einki nýtt í, at tað ikki altíð er líka lætt at reka eitt fótbóltsfelag, og enn minni, tá talan er um felag, sum hevur yrkisleikarar knýtt at sær.

Í fjør heyst var longu greitt, at fyrrverandi felagið hjá Toda Jónsson, Lyngby, var farið á heysin, og í farnu viku stóð greitt, at enn tvey fyrrverandi »føroysk« feløg mest sum hava snarað lyklinum.

## Fekk ikki íbúðina

Fyrra av hesum var danska B93, sum í longri tíð hevur havt fíggjarligar trupulleikar at dragast við.

Í heyst leikti Øssur Hansen í hálvan triðja mánað við felagnum, og sjálvur sigur hann, at longu tá vbar sjónligt, at felagið ikki var serliga væl fyri.

- Eitt nú høvdu teir lovað mær, at eg skuldi fáa eina íbúð mitt í Keypmannahavn, soleiðis at teinurin til venjingar skuldi vera so stuttur sum gjørligt, men soleiðis gjørdist ongantíð. Ístaðin varð eg parkeraðut í Gilleleje, og skuldi eg hvønn dag nýta út við tríggjar tímar fyri at koma til og frá venjing.

- Í longdini var hetta sjálvandi ikki nóg gott, og tá felagið so hevði kallað til fundar í november, var nóg mikið. Á hesum fundinum vórðu kortini løgd á borðið. Leikararnir fingu at vita, at vit máttu niður í løn, soleiðis at vit gjørdust hálv tíðar leikarar, og hetta hevði eg als ikki hug til. Fýra aðrir leikarar vóru longu rýmdir vegna vánaligu fíggjarstøðuna, og sjálvur gjørdi eg tá av at flyta heimaftur til Føroya, hóast fýra dystir restaðu av heystarhálvuni, sigur Øssur, sum tó ikki misti nakran pening av hesum.

- Nei. Tíbetur fekk eg avklárað alt tað peningaliga, áðrenn eg fór. Seinastu mánaðarlønina sá eg gott nokk ongantíð, men hinvegin spældi eg heldur ikki við teimum tá, so tað man helst vera í lagi, heldur toftamaðurin.

## Leiftur er liðugt

Um sama mundi, sum tíðindini um B93 bórust, skrivaðu íslendskir fjølmiðlar, at Leiftur var farið í gjaldssteðg. Hetta er felagið, har Uni Arge, Jens Martin Knudsen, John Petersen, Sámal Joensen og Jens Erik Rasmussen hava roynt seg, umframt at Páll Guðlaugsson eitt skifti eisini var venjari har.

Felagið var fyri fáum árum síðani íslendska fótbóltsoddinum, og millum annað royndu teir seg í Inter-Toto cup so seint sum í 2000, men síðani hevur bert gingið ein veg. Niðureftir.

Peningaliga hevur felagið ikki verið nóg sterkt til at standa ítróttarliga niðurtúrinum, og nú eru teir altso farnir í gjaldssteðg. Tað er eingin loyna, at tá fleiri av føroysku leikarunum í felagnum settu kós heim aftur fyri einum ári síðani, var hetta partvíst av fíggjarligum ávum, og sum skilst eru hesi millumverandi ikki avklárað enn.

Saman við øðrum ognarum hjá felagnum, mugu føroysku leikararnir nú senda inn krav til trotabúgvið hjá Leiftri, men tað man vera sera ivingarsamt, hvussu nógv fer at koma burtur úr hesum. Pengarnir frá annars trúgvu stuðlunum hja felagnum hava ikki verið nógvir seinastu tíðina, og ivasamt er, hvat ognirnar (les leikarahópurin) hjá einum íslendskum 2. deildarliðið eru verdar.

# Rumeni til B36



*Formaðurin í B36 vil ikki gera viðmerkingar, men tað tykist púrasta víst, at ein rumenskur leikari er ávegis til árstalsfelagið*

**Hóast formaðurin ikki fæst at vátta nakað, so skuldi tað verið heilt víst, at B36 hevur tryggjað sær ein rumenskan leikara til komandi árið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá skrivað hevur verið um B36 í vetur, so hevur talan fyri tað mesta verið um frágongdina, sum meistararnir hava havt. Av hópinum, sum í fjør gjørdist greipuvinnarar eru Jan Guttesen, Pól Thorsteinsson og Heðin á Lakjuni allir farnir burturfrá, meðan tað hevur verið so sum so við tilgongdini. Ikki tí. Felagið hevur víst á, at fleiri leikarar úr egnari røð eru ávegis, eins og gitingarnar um styrk uttan ífrá hava verið nógvar, men higar til hava hetta bert verið gitingar.

Nú skuldi tað tó verið heilt víst, at Piotr Krakowski hevur nýtt vetrarfrítíðina í Pólandi til at tryggja liðnum tilgongd við einum rumenskum miðvallara, og væntandi skuldu leikararnir í felagnum fáa boð um hetta á spælarafundi mánakvøldið. Tað hevur áður ljóðað, at Iulian Florescu, sum annars hevur leikt við B71, skuldi verið upp á tal hjá B36, men sum skilst, so er tað ikki hesin, sum talan nú er um.

Sær sjálvum so líkur, so er formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, tættur sum tunnan, tá vit sunnudagin royndui at fáa staðfest tíðindini, og vildi hann ikki gera viðmerkingar av nøkrum slag.

Sambært álítandi keldum, so skuldi tað tó verið heilt víst, at rumenski leikarin er komin undir land, og at B36 í løtuni bert bíðar eftir, at innferðar- og arbeiðsloyvi hjá hesum eru komin í rættlag.



# Ion komin við rumena



*Stjórin í HB sigur, at fyri fyrst er HB liðugt við at styrkja sær um hópin*

**Miðvøllurin hjá HB er komandi árið styrktur við einum 33 ára gomlum rumena**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Vit hava áður skrivað, at HB í vetrarstegðinum hevði vent eyguni móti Rumenia. Heimlandinum hjá HB-venjaranum, Ion Geolgau.

Nú er líkt til, at hetta í øllum førum hevur givið úrslit í tilgongd av einum leikara, tí tá Ion um vikuskiftið kom til Føroya, hevði hann ein av landsmonnum sínum við sær.

Talan er um ein 33 ára gamlan miðvallarleikara, Nico, sum í fleiri ár hevur roynt seg í næstbestu rumensku deildini.

Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbóltur, sigur við Sosialin, at tað ikki er víst, at HB við hesum hevur fingið endaliga hópin til kappingárið.

- Hetta er so tað, sum vit hava valt at styrkt hópin við fyri fyrst. Nú mugu vit líka fáa venjingarnar í gongd og fáa yvirlit yvir hópin, áðrenn gjørt verður av, um talan verður um at knýta fleiri leikarar at felagnum, sigur hann í stuttari viðmerking.

# Linklett venur KÍ



*Marek aftur til Klaksvíkar. Enn er einki likið út frá nevndini um hetta, men í Klaksvík eru fleiri, sum longu nú siga hetta vera veruleiki*

**Fyrrverandi landsliðsmálverjin hevur játtað at hjálpt Kurt Mørkøre, og leysasøgur senda Marek Wiersbicki aftur til Klaksvíkar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Á heimasíðu sínari skrivar KÍ, at Kurt Mørkøre og Jógvan Linklett eru komnir ásamt um, at hesin seinni nevndur framyvir skal taka sær av málmansvenjingini í felagnum.

Jógvan Linklett hevur annars ikki verið so nógv frammi í føroyskum fótbóltshøpi seinnu árini, men føroyingar og serstakliga klaksíkingar fara helst seint at gloyma tíðarskeið hansara millum stengurnar. Bæði hjá KÍ og føroyska landsliðnum. Og tó at vit í dag hava tveir málverjar á landsliðnum, sum báðir hava roynt síni evni uttan fyri landoddarnar, so eru fleiri á einum máli um, at Jógvan helst er besti málverjin, sum føroyingar hava átt.

Hetta er so enn ein liður í arbeiðinum hjá KÍ í vetur, har bæði innihald og karmar hjá besta mansliðnum eru styrktir munandi, og skulu vit trúgva leysasøgunum, so er als ikki víst, at hetta arbeiði er liðugt enn. Í øllum førum hava leysasøgurnar stóran skund við at senda Marek Wiersbicki aftur til Klaksvíkar, har hann í 1999 var við til at vinna FM, men enn hevur tað so ikki eydnast okkum at fáa hesi tíðindi váttað.

# Góð føroysk avrik

**Føroyskir telvarar í Keypmannahavn royndu seg í vikuskiftiskapping, og sum heild gekst avbera væl**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Ikki færri enn fimm útisetar luttóku í árligu Farum Frost vikuskiftiskappingini, norðanfyri Keypmannahavn. Telvað varð í vikuskiftinum 18-20. januar. Fimm umfør skuldu telvast. 32 telvarar royndu seg í tveimum bólkum.

Í ovasta og sterka bólkinum vann Mikkel Strange (2204 DK rating) við heili hálvumfimta stigi av fimm møguligum. Hálva stigið gav hann ímóti Carl Eli N. Samuelsen. Hesin seinast nevndi og Heini Danielsen vórðu javnir á øðrum plássi við hálvumfjórða stigi. Heini og Mikkel lógu undan seinasta umfari javnir og hittust eisini hetta lagnuumfar. Heini fekk betri støðu í miðspælinum, men tapti tíverri tá hann misti finnu í endatalvinum.

Á deildum fjórða plássi við trimum stigum, saman við tveimum dønum, vórðu Terji Petersen og Regin Reinert. Regin hevði eina óvanliga góða kapping, meðan Terji — hóast mongu stigini — missur nøkur ratingstig. Í B-bólkinum fekk Dannie Nielsen hálvtriðja stig og fekk eitt miðalpláss.

Sæð við føroyskum eygum spældi kappingin tískil væl av.

## Ponomariov stevnir móti HM- heitinum

Í desember leiktu 32 ára gamli Vassily Ivanchuk og 18 ára gamli Ruslan Ponomariov — báðir úr Ukraina — seg í finaluna í Heimsmeistaraskapinum hjá talvsamgonguni FIDE. Telvað verður í Moskva. Átta talv skulu telvast, og í skrivandi løtu eru fýra talv telvd. Heldur óvæntað hevur Ponomariov — sum telvaði í GM-kappingini í Norðurlandahúsinum í okt. 2000 — tikið leiðsluna. Hóast Ponomariov við sínum 2727 er ratingfavorittur varð mett at Ivanchuk (2717) við sínari rutinu hevði tey betru kortini.

Ponomariov vann eitt sera stuttleikt og merkisvert talv í fyrsta umfarinum, sum er við í blaðnum í dag, og hava teir síðani leikt tríggir javnleikir á rað. Ivanchuk hevur havt sínar kjansir at javna úrslitið, men Ponomariov hevur vart seg væl. Fýra talv resta í, og spennandi verður at síggja um Ponomariov megnar at halda Ivanchuk frá kongi sínum.

Samstundis sum HM — finalan verður leikt, er heimselitan savnað í hollendska býnum Wijk, har sterk kapping í løtuni verður telvd. Tíverri eru topp trý ikki við, Kasparov, Kramnik og Anand. Kasparov bleiv forðaður vegna influensu, meðan hinir góvu avboð av ymsum orsøkum. Men manningin er hóast hetta sera sterk, við eitt nú Adams, Morozevich, Leko, Bareev, Grischuk o.a.

Eftir sjey umfør er Bareev fremstur við fimm stigum, meðan Adams, Grischuk, Khalifman og Morozevich eru hálvt stig aftari í toppinum. Fjúrtan telvarar luttaka, sum merkir at trettan talv skulu telvast.

## Talvið hesa vikuna

**Ponomariov,R (2727) - Ivanchuk,V (2717)**
**WCC 2001-2002 Final Moscow. 16.01.2002**
**Fronsk byrjan**

1.e4 e6 2.d4 d5 3.Ric3 Rif6 4.Bg5 dxe4 5.Rixe4 (svartur kemur at standa eitt petti passivt, men hinvegin trygt nokk) 5...Be7 6.Bxf6 Bxf6 7.Rif3 0-0 8.Fd2 Be7 9.0-0-0 Fd5 [9...b6 er tann tryggi møguleikin] 10.Ric3 Fa5 11.a3! (ein nýggjur leikur í hesari støðu. vanligt er Rie5 Bb4 við jøvnum spæli. Nú er Bb4 ikki gjørligt vegna hesa í roynd og veru logisku nýggjheit) 11...Rid7 12.Kb1 Fb6 13.Fe3 Rif6 [13...Bxa3?? 14.Ria4!] 14.Rie5 Rd8 15.Bc4 Bd7 16.Bb3 Be8 17.Rhe1 (hvítur stendur fyrimyndarliga væl við øllum sínum aktivu fólkum) 17...Bf8 18.g4 Rid5 19.Ff3 c6 20.Rie4 Fc7 21.c4 Rie7?? (hesin annars óskyldugt líknandi leikur er tapandi. Rib6 var einasti leikur) 22.Rig5 Ric8 [22...Rig6 23.Rixg6 hxg6 24.Fh3] 23.c5!



og svartur, Ivanchuk, gavst! hvítur hóttur t.d Rixf7 Bxf7 Bxf7 Rixf7 Fxf7 Bxe6. Einki kann svartur gera, uttan at geva býtismun við Rd5, og tað tapur sjálvandi eisini í longdini 1-0